# Tjalding og vallaraheim á G! Festival



FESTIVALUR
*Tíðindaskriv*

G! Festival bjóðar aftur í ár gestum at tjalda í Gøtugjógv tætt við Gøtu skúla, men sum nakað nýtt ber eisini til at bíleggja sær vallaraheimspláss, ella rúm í sovisali, sum verður í Gøtuskúla, umframt at tað eisini verður møguligt hjá festivalgestum at goyma virðislutir, klæðir og annað, sum ikki skal liggja ólæst í tjaldinum í skúlanum. Svimjifelagið Skeggjar tekur sær av tjaldingini, vallaraheiminum og varðveitslutænastuni í samstarvi við G! Festival

Tænastan er serliga ætlað fólki úr øðrum oyggjum, ið hava langan veg heim, og sum tí ynskja at gista í Gøtu.

Tjaldingin var sera væl umtókt seinasta ár og alt plássið var uppi eftir stuttari tíð. Í ár eru týðiligar ábendingar um, at gravgangurin verður enn størri. Av tí at plássið er avmarkað, er skilabest hjá teimum, ið ætla sær at tjalda ella gista í sovisali, at bíleggja sum skjótast.

G! Festival takkar Gøtu Kommunu og Gøtu skúla fyri loyvi at nýta skúlan og bóndanum Árant Hansen, fyri at lata øki til tjaldingina.

Tjaldingarøkið og Vallaraheimið á G! lata upp Fríggjamorgunin 16, juli klokkan 10.00. Tað er ein treyt, at tey, ið vilja gista á tjaldingarøkinum ella á vallaraheiminum hesar dagarnar, hava atgongumerki til G! Festival

Bíleggingar fara fram á tel 22 72 42 ella á camping@gfestival.com

Kostnaður fyri tjalding er 60 fyri hvønn persón fyri vikuskiftið. Kostnaður fyri Vallaraheim er 130 krónur pr nátt pr persón.




UPP & AFTUR-LATINGARTÍÐIR

Svimjihøllin verður opin allan dagin í summarfrítíðini, undantikið mikudag og sunnudag, frá mánad. 21/6-2004 til leygard. 7/8-2004




Tíðirnar eru hesar:

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Týsdag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Mikudag | kl. 06:45 - 09:00 |
| Hósdag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Fríggjadag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Leygardag | kl. 09:00 - 17:00 |
| Sunnudag | kl. 08:00 - 10:00 |
| & | kl. 14:00 - 17:00 |

SVIMJIHØLLIN Í GUNDADALI
Hoydalsvegur 21 · Tel 311550



UTTAN ÚR HEIMI

# Stúra fyri yvirgangi ímóti olympisku leikunum



*Gamla belgiska súkklarastjørnan Eddy Merckx við tí olympiska eldinum, sum skal til 34 býir í 27 londum á vegnum til Athen*

**Ein frágreiðing hjá amerikonsku Kongressini ávarar um, at yvirgangsmenn kunnu fara at søkja at olympisku summarleikunum í Athen**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sambært frágreiðingini er tað rættiliga sannlíkt, at yvirgangsmenn, sum hava tilknýti til al-Qaeda, fara at royna at søkja at olympisku leikunum, og at teir helst fara at leggja seg eftir at fáa sum mest burtur úr atsóknini. Tað er tí ikki óhugsandi, at teir fara at nýta eina bakteriur, stendur í frágreiðingini.

Carol Migdalowitz, sum hevur skrivað frágreiðingina, sigur við tíðindastovuna AP, at tað eru fleiri orsøkir til, at vit kunnu vænta eina ella fleiri atsóknir at leikunum í Athen. Hon vísir á, at demokratiið hevur sín uppruna í Grikkalandi, og at yvirgangsmenn tí ivaleyst halda tað hava ein serligan týdning at søkja at har. Í øðrum lagi fara fleiri milliardir fólk at fylgja leikunum í sjónvarpinum, og tí kunnu yvirgangsmenninir fáa sín boðskap út um allan heimin. Í triðja lagi er Grikkaland ein partur av Vesturheiminum, sum yvirgangsmenninir leggja seg eftir at søkja at, sigur Carol Migdalowitz.

## Freistin

Amerikanska kongressfrágreiðingin nevnir eisini eitt annað, sum kann vera ein fráboðan um, at al-Qaeda ætlar at søkja at olympisku summarleikunum.

Tann 15. apríl kunngjørdi Osama bin Laden, at hann fór at lata friðardyrnar standa opnar fyri Vesturheiminum í tríggjar mánaðir. Tann 15. juli rennur hendan freistin út, og fýra vikur seinni byrja leikirnir í Athen.

Grikska løgreglan hevur havt samband við løgregluna í hinum evropeisku londunum. Ætlanin er, at hini londini skulu gera sína meting av vandanum fyri yvirgangi undir leikunum, skrivar AP.

# Kirkjan í Dresden endurbygd

**Í februar í 1945 bumbaðu amerikonsk og bretsk flogfør týska býin Dresden í sor. Millum annað oyðiløgdu bumburnar ta stóru Frauenkirche, men nú er hon bygd uppaftur**

ENDURBYGGING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Í hesi løtu verður eitt sár í sjálvum hjartanum á Evropa grøtt, segði leiðarin í týska statinum Sachsen, Georg Milbradt, tá spírurin á Frauenkirche í býnum Dresden varð settur upp á pláss týsdagin.

Frá 13. til 15. februar í 1945 bumbaðu amerikonsk og bretsk Dresden. Ein stórur partur av býnum varð javnaður við jørðina. Eldur kom í Frauenkirche, og nakrar dagar seinni rapaði hon í grund. Nú er hon bygd uppaftur, og millum annað eru 3.634 steinar úr teirri upprunaligu kirkjuni brúktir aftur í teirri nýggju.

Tann meiri enn fimm metrar høgi spírurin er gjørdur eftir tí upprunaliga. Tað er ein onglendingur, sum hevur gjørt hann. Pápi hansara var ein av flogskiparunum, sum bumbaði Dresden fyri 59 árum síðani. Arbeiðið er fíggjað í Onglandi, millum annað av fólki í býnum Coventry, sum týskarar bumbaðu í sor undir seinna heimsbardaga.

Ætlanin er eisini, at Frauenkirche skal vera eitt tekin um frið.

– Í dag sendir Dresden øllum heiminum ein boðskap. Tann endurreista kirkjan skal vera eitt altjóða tekin um frið og semju, var boðskapurin hjá Georg Milbradt.

## Alivinnan skipar seg

Alivinnan í Danmark hevur nú skipað sum í eitt nýtt felag, ið hevur fingið navnið Dansk Akvakultur.

Í tí nýggja felagnum eru feløg, sum ala fisk á sjónum og í alibrúkum á landi, állaalarar, fiskaútflytarar, fóðurvirkir og virkir, sum arbeiða tann alda fiskin. Roknað verður við, at limatalið verður um 300. Eitt av endamálunum við felagnum er at fyrireika limirnar til kappingina á marknaðinum.

Alifeløgini, sum fara upp í tað nýggja felagið, ala umleið 40.000 tons um árið. Umleið 95 prosent verður útflutt, og útflutningsvirðið táttar í eina milliard krónur, skrivar Ritzau.

## Clinton hetja í Kosovo

At fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton er væl umtóktur í Kosovo sæst á teimum mongu støðunum har, sum bera navn hansara. Í høvuðsstaðnum Pristina er ein gøta, sum hevur navn eftir Clinton, og har eru eisini fleiri handlar, sum hava navn eftir honum. Á vegginum á einum stórum íbúðarhúsum er eisini ein stórur málningur av fyrrverandi forsetanum.

Orsøkin til ta góða umdømið hjá fyrrverandi forsetanum er, at hjá teimum flestu albanunum í Kosovo er hann tann stóra hetjan. Hann gjørdi sítt til at tryggja frið í Kosovo, og nógvir kosovoalbanar halda, at hevði Clinton verið sitandi í Hvítu Húsunum, hevði Kosovo verið eitt sjálvsstøðugt land í dag.

Harafturímóti er George W. Bush ikki so avhildin í Kosovo. Sagt verður, at Bush slepti Kosovo upp á fjall, tá hann legði á Afghanistan, og at Afghanistan fekk somu lagnu, tá Bush gjørdi av at leypa á Irak.

## Í Barentshavið at bora

Norsk Hydro ætlar nú at fara undir at bora eftir olju og gassi í Barentshavinum, og gongst sum ætlað, verður borurin settur í havbotnin umleið 1. oktober.

Mánadagin søkti Norsk Hydro umhvørvismyndugleikarnar um loyvi til tað neyðuga útlátið, sum stendst av boringini, men umhvørvisfelagsskapurin Bellona heldur, at felagið hevur givið myndugleikunum alt ov stutta tíð til at viðgera umsóknina. Víst verður á, at myndugleikarnir kunnu ikki taka støðu fyrr enn aftan á tann 10. august, og tá kunnu teir vænta at fáa eina ella fleiri kærur. Tær fara at taka tíð, so Norsk Hydro kann ikki vænta at sleppa at bora fyrr enn einaferð í desember, sigur Bellona.

Í Norsk Hydro halda tey ikki, at Bellona og aðrir umhvørvisfelagsskapir hava nakað at stúra fyri. Felagið sigur, at øll neyðug stig verða tikin fyri at verja umhvørvið undir royndarboringini, og at ein tilbúgvingarætlan er løgd, skuldi okkurt óhapp hent.

## Fleiri ómaksgjøld

Tann lága rentan ger, at munurin á innlánsrentuni og útlánsrentuni hjá teimum donsku peningastovnunum er so lítil, at teir forvinna ikki so nógvar pengar longur.

Tað hevur fingið peningastovnarnar at umhugsa at taka fleiri ómaksgjøld frá viðskiftafólkinum, skrivar Børsen. Blaðið skrivar, at tey seinastu tíggju árini hava peningastovnarnir økt inntøkuna av ómaksgjøldum úr seks upp í sekstan milliardir krónur. Tað merkir, at ein triðingur av inntøkunum hjá peningastovnunum stavar frá ómaksgjøldum, og hóast tað ljóðar av nógvum, er hetta munandi minni enn aðrastaðni. Eitt nú stava 56 prosent av inntøkunum hjá teimum svensku bankunum frá ómaksgjøldum, og í Niðurlondum eru tey 45 prosent av inntøkuni.

Aðalstjórin í Danske Bank, Peter Straarup, heldur ikki, at tað ber til at hækka verandi ómaksgjøld. Ístaðin fyri eiga peningastovnarnir at geva viðskiftafólkinum okkurt nýtt, sum teir so kunnu forvinna meiri pengar burturúr, sigur hann við Børsen.